Gjørdu sín egna lista

KOMMUNUVAL
Áki Bertholdsen

Sandvík er eitt av teimum smærru valstø›unum í landinum. Men ta› for›ar teimum ikki í at hava áhuga fyri politikki.

Sandvík er í Hvalbiar Kommunu. Og sandvíkingar vóru ikki minst spentir uppá vali› í gjár, tí hesufer› hava teir gjørt sín egna lista til bygdará›i›. Tey vóna›u at fáa eitt umbo› í bygdará›i›, helst nú ta› skulu veljast sjey fólk í bygdará›i›, afturímóti teimum fimm, sum hava siti›. Sandvíkingar halda, at ta› er ov líti› hent í bygdini og tí halda tey, at ta› er ney›ugt, at fáa eina rødd í bygdará›i› at tala teirra søk.

Annars vór›u tveir a›rir sandvíkingar uppstilla›ir, men ta› var á ø›rum listum. Tilsamans vóru f‡ra listar at velja ímillum.

Í Sandvík høvdu 88 fólk valrætt hesufer› og mi›degi í gjár høvdu longu 26 fólk valt.

Hetta er nógv størri valluttøka enn í Hvalba, sum er hitt valsta›i› í kommununi. Í Hvalba høvdu 469 fólk valrætt hesufer›, men ta› høvdu bara 30 fólk valt á mi›degi í gjár.

Sandvík er annars ein av teimum fáu smá bygdunum, sum kunnu vísa á ein fólkavøkstri, tí tá i› kommunuval var seinast, høvdu 85 fólk valrætt. Í 1996 høvdu 28 fólk valt á mi›degi.

Í Sandvík, eru er eitt av teimum smærru valstø›unum. Men har vóru tey serliga spent uppá vali› í gjár, tí hesufer› hava tey gjørt sín egna lista til vali›. Her er ta› Emmy Klettheyggj, eitt av valevnunum á Sandvíkarslistanum, sum grei›ir atkvø›u á mi›degi í gjár.

Fólk bí›a›u vi› dyrnar

57 valevni bjó›a›u seg í gjár fram á b‡rá›svalinum í Klaksvík

B†RÁ‹SVAL
Ey›un Klakstein

Klaksvík: Fólk møttu upp vi› fyrstu krossunum beinanvegin, tá valhøli› í Klaksvík lat upp t‡sdagin.

Í Klaksvík fer b‡rá›svali› fram í KÍ-høllini, og líka frá klokkan 10.00 komu fólk til vali›.

3377 fólk hava valrætt til b‡rá›svali› í Klaksvík, og tey hava 57 valevni í seks ymiskum flokkum at velja ímillum.

Møguleiki er hjá klaksvíkingum at velja júst sama b‡rá›i› inn aftur, tí allir b‡rá›slimirnir stilla upp aftur á valinum hesafer›.

Farna f‡ra ára skei› hevur Fólkaflokkurin havt borgarstjóran. Fólkaflokkurin hevur havt f‡ra b‡rá›slimir. Tjó›veldisflokkurin og Javna›arflokkurin hava havt tveir í part, og sí›ani hava Sambandsflokkurin, Sjálvst‡risflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin havt hvør sín b‡rá›slim.

Valhøli› í Klaksvík var opi› til klokkan 20.00 í gjárkvøldi›, men vali› helt fram til ste›gur kom í. Rokna› var vi›, at úrsliti› var klárt eina fer› um ellivu tí›ina.

Nógv fólk var á b‡rá›svalinum í Klaksvík fyrrapartin í gjár.

Mynd: TS

3377 fólk hava valrætt til b‡rá›svali› í Klaksvík hesafer›.

Mynd: TS

Nógv færri poppfløgur í ár

Ta› hevur veri› rúmligari hjá føroyskum útgávum á fløgumarkna›inum í ár, og hóast fitt av fløgum kemur út til jólasøluna, er talan um nógv færri útgávur í ár enn í ár

TÓNLEIKUR
Ey›un Klakstein

Seinastu tvey árini hevur føroyski jólamarkna›urin veri› yvirfloymdur av føroyskum popp- og rockútgávum, men í ár kappingin ikki veri› tann sama.

Ta› eru komnar nógv færri fløgur út í ár, enn ta› gjørdi í fjør, og eisini nú undan jólasøluni eru útgávurnar færri í tali, enn tær vóru í fjør.

– Ein orsøk til hetta kann vera, at nógv færri bólkar eru aktivir í løtuni, enn ta› vóru í fjør. Og nógvu útgávurnar seinnu árini hava eisini havt vi› sær, at nógv hava brent fingrarnar, tí tey hava ikki selt naka› serligt, sigur Høgni Zachariasen, lei›ari av fløgudeildini hjá 3'aranum.

– Eg rokni vi›, at fólk hava ásanna›, at ta› er tungt at fáast vi› tónleikaútgávur, og summi hava fingi› ein fíggjarligan smeit, tí tey hava ikki selt nóg nógv. Men eg rokni vi›, at ta› er fyrst og fremst tilvild sum ger, at ta› koma færri útgávur í ár, heldur Steintór Rasmussen, sum rekur Studio Pegasus í Klaksvík.

Naka› av poppi

Flaggskipi› hjá 3'aranum til jólasøluna í ár er savnsfløgan vi› Ey›uni Nolsøe og Terja Rasmussen, sum er sera væl móttikin.

Studio Pegasus kemur vi› tveimum fløgum. Onnur er ein fløga vi› sangum hjá svianum Bjørn Afzelius, sum eru t‡ddir og innspældir vi› føroyskum tónleikarum og sangarum. Hin er ein n‡ggj fløga vi› Kulum Rótum og Trølla-Pæturi, sum hava veri› ta› stóra hitti› á fløgumarkna›inum seinasta ári›.

Tutl kemur vi› nógvum fløgum til jóla, men talan er bara um tvær útgávur, sum kunnu sníkja seg undir heiti› poppfløga. Onnur er vi› Eivør Pálsdóttir, og hin er vi› Jóan Jakku Guttesen. Umframt hetta kemur Tutl vi› seks ø›rum útgávum vi› jazzi, fólkatónleiki og skjaldrum.

HCW Tórgar› fer at endurútgeva eina plátu vi› Teimum á Kamarinum. Talan er um útgávuna frá 1983 vi› nógvum av teirra kendastu sangum.

Umframt hesar fløgur, vita vit eisini um, at Torkil Mørkøre er li›ugur vi› innspælingarnar av eini fløgu, sum ætlandi skal koma út í ár.

Vænta inntøku av poppinum

Øll útgávufeløgini siga, at tey hava givi› færri fløgur út í ár, enn tey gjørdu í fjør.

Plátufelagi› Tutl gevur tónleik av alskyns slagi út, men í fjør og í 1998 góvu teir fleiri popp- og rockfløgur enn vanligt út.

– Vit hava havt trupulleikar vi› at fylgt vi›, tí ta› hava veri› so nógvar útgávur. Í ár er talan um færri fløgur, og ta› ger ta› eisini lættari hjá okkum at gera vart vi› tær fløgurnar, sum vit geva út, sigur Kristian Blak, stjóri í Tutl.

– Fólk, sum hava givi› popptónleik út, hava kanska vænta› eina inntøku av tónleikinum, men í nógvum før›um hava tey mugu goldi› fyri ein part av útgávuni. Kappingin hevur veri› hør›, og tí hava allar fløgurnar ikki selt eins nógv. Ta› kann hava ávirkan hugin til at geva popp- og rockfløgur út í ár, sigur Kristian Blak.

Einar tríggjar fara at selja

Kappingin um krónurnar hjá fløgukeyparunum hevur veri› sera hør› seinastu tvey árini, og nógvar útgávur hava als ikki selt ta›, sum skuldi fyri at fáa útrei›slurnar fyri framlei›sluna inn aftur.

– Flestu fløgurnar skulu selja eini 1000 eintøk fyri at bera seg fíggjarliga, men seinastu árini eru ta› bara heilt fáar fløgur, sum hava selt so nógv. Útbo›i› hevur veri› so stórt, at nógvar gó›ar fløgur eru dottnar ni›ur ímillum, sigur Høgni Zachariasen í 3'aranum.

– Hetta ger, at fleiri bólkar hava sett pengar til, og teir geva so í øllum før›um ikki eina fløgu út aftur í ár. At ta› koma færri føroyskar útgávur lættir eitt sindur um kappingina, men eg rokni framvegis vi›, at í jólasøluni ver›a ta› eini tríggjar fløgur sum fara at selja heilt væl, sigur Høgni Zachariasen.

Hevur veri› trongligt

Steintór Rasmussen, sum rekur Studio Pegasus í Klaksvík, heldur, at summir bólkar eru í bí›istø›u, men at teir fara at koma vi› útgávum innan ov leingi.

– Eg rokni vi›, at fleiri bólkar hava hug at koma vi› n‡ggjum útgávum, men at teir kanska bí›a til møguleikin er at gera eina gó›a fløgu, heldur hann.

– Ta› hevur veri› trongligt á fløgumarkna›inum seinastu árini, og ta› hevur gjørt, at nógvar fløgur eru drukna›ar í mongdini. Ta› hevur kanska veri› eitt vónbrot hjá teimum, sum hava givi› út, men eg rokni vi›, at ta› er rættiliga tilvildarligt, at ta› koma færri fløgur í ár enn í fjør, sigur Steintór Rasmussen.

Høgni Hoydal: Vit taka fullveldi um nøkur fá ár

– Vit skulu hava eina grei›a avtalu vi› danir um, nær blokkurin skal vera fallin burtur. Og ta› skulu ikki ganga nógv ár, á›renn vit hava tiki› fullveldi, sigur Høgni Hoydal

VELJARAKANNING
Áki Bertholdsen

Nú skal avtala gerast vi› danir um, nær føroyingar í seinasta lagi skulu hava yviurtiki› øll málsøki. Avtalan skal eisini siga púra greitt, nær blokkurin skal vera burturdottin. Og ta› ver›ur í øllum før›um á›renn 15 ár eru farin, sigur Høgni Hoydal.

– Ta› einasta, vit nú kunnu gera, er, at vit sjálvi taka fullveldi. Og ta› skal vera um nøkur fá ár.

Høgni Hoydal, landsst‡risma›ur í fullvedismálum, sigur, at samrá›ingarnar vi› donsku stjørnina hava prógva›, at vit høvdu aldrin fingi› eina avtalu vi› danir um føroysk fullveldi, tí danir vilja heilt einfalt ikki av vi› Føroyar.

– Tí er ta› heldur ikki í samsvari vi› veruleikan, at vit høvdu fingi› fullveldi vi› f‡ra ára skiftistí›, tí ta› høvdu vit ikki fingi›.

– Aftan á annan samrá›ingarfund var stø›an annars tann, at skiftistí›in var at kalla ta› einasta, sum var eftir at samrá›ast um. Men á tri›ja fundinum vildi danska stjørnin aftur hava, kanningar og útgreiningar gjørdar, heilt ni›ir í smálutir, og hon vildi ikki skriva undir naka›, fyrrenn semja var fingin um hvønn smálut.

– Ta› sigur mær so miki›, sum at vit kundiu samrá›st til dómadag, vit høvdu ikki fingi› naka› úrslit kortini.

Høgni Hoydal sigur, at veljarakanningin, sum var› gjørd í farnu viku, vísir eisini heilt t‡›iligt, at hetta er føroyski veljarin nú fullgrei›ur yvir.

– Ta› er einasta ni›urstø›a, vit kunnu koma til, tá i› vit síggja, at heili 34% av veljarunum høvdu veri› rei›ar at tiki› loysing, hóast skiftistí›in bara er f‡ra ár.

– Samstundis vísir kanningin, at veljarin tekur undir vi› teirri n‡ggju fullveldislei›ini hjá landsst‡rinum.

Men kortini eru ta› heili 17% sum ivast í teirri n‡ggju fullveldisætlanini.

Høgni Hoydal heldur, at orsøkin til ta› er, at uppl‡singarnar um tær n‡ggju ætlanirnar, hava veri› eitt sindur ógrei›ar.

Høgni Hoydal sigur, at ta›, sum landsst‡ri› nú mi›jar eftir er at fáa eina n‡ggja avtalu vi› danir um fullveldi.

– Talan skal ikki vera um n‡ggjar samrá›ingar sum so. Men talan skal vera um at gera eina n‡ggja avtalu á embætismannastigi um fullveldi. Hetta skal vera ein púra grei› avtala um, nær tey seinastu málsøkini í heimast‡rislógini skulu vera yvirtikin.

– Og talan skal vera um eina avtalu um, nær blokkurin skal vera burturdottin. Avtalan skal vera solei›is, at ta› ber til hjá okkum at framskunda dagin fyri, nær fullveldi› skal koma í gildi. Og ta› er hendan ætlanin, sum fólkaatkvø›a skal vera um í apríl mána›a komandi ár. Tá ver›ur eisini atkvø›ugrei›sla um at stovna føroyska ríki.

Høgni Hoydal leggur dent á, at talan tískil ikki er um at halda fram í heimast‡risskipanini.

– Hetta er ein fullveldisætlan, sum skal siga púra greitt, nær vit skulu hava fullveldi.

Um nøkur fá ár

Og Høgni Hoydal leggur dent á, at talan skal vera um at taka fullveldi um nøkur heilt fá ár.

– Nakar dagur er ikki ásettur enn. Eg havi nevnt 2006 sum eitt dømi. Onkur annar hevur sagt, at ta› fer at taka nógv longri tí› at fáa blokkin burtur.

– Ta› er óheppi› um hetta ver›ur gjørt til eitt partapolitiskt rumbulsmál. Men ta› er í øllum førum greitt, at talan ver›ur um nøkur heilt fá ár, uttan at eg fari at seta naka› ávíst áramál á. Kortini skal talan vera um eitt áramál, sum allir samgonguflokkar kunnu taka undir vi›.

Ver›ur ta› 15 ár, sum upprunaliga ætlanin um skiftistí› var?

– Ta› ver›ur í øllum førum styttri enn ta›, sigur Høgni Hoydal

Høgni Hoydal er bilsin av gongdini

- Veljarakanningin, sum var› gjørd í sí›stu viku, vísir t‡›iligt, at ráki› fram ímóti einum føroyskum fullveldi, heldur landsst‡risma›urin í fullveldismálum.

VELJARAKANNING
Áki Bertholdsen



- Tú skalt í sterkar brillur fyri at finna naka› negativt. Veljarakanningin vísir tvørturi ímóti, at gøtan hjá veljaranum er grei›, sigur Høgni Hoydal

– Eg eri rættiliga bilsin. Hetta vísir jú, at ta› er meiri enn 1/3 av veljarunum, sum vilja hava fullveldi, hóast skiftistí›in bara ver›ur f‡ra ár.

Høgni Hoydal, landsst‡risma›ur í fullveldismálum, heldur, at veljarakanningin, sum var› gjørd í farnu viku, er ein sigur fyri føroysku fullveldisrørsluna. Hann fegnast um, at kanningin vísur, at hev›i løgtingsval veri› í dag, hev›i tjó›veldisflokkurin veri› størsti flokkur á tingi, hóast ta› oftani er d‡rt at sita í samgongu, og hóast ákoyringarnar hava veri› øgiligar.

Hann fegnast um, at samgongan gongur mundandi fram og hann fegnast um, at veljarin tekur undir vi› teirri n‡ggju kósini, sum samgongan hevur sett í fullveldismálinum.

– Kanningin er sera positiv. Tú skalt í sterkar brillur fyri at finna naka› negativt, heldur Høgni Hoydal.

Men ta›, i› hann kanska tekur sum ein tann størsta sigurin, er, at kanningin vísir, at heili 34% av veljarunum høvdu atkvøtt fyri fullveldinum, hóast skiftistí›in bara er f‡ra ár.

– Ta› er í veruleikanum eitt skarvslop til frama fyri fullveldi, tí ta› er nógv meiri enn tann seinasta veljarakanningin vísti.

Gøtan er grei›

Annars heldur hann, at ein veljarakanning, sum hendan, kann bara vísa eitt rák í fólkinum, og tí skal hon tulkast vi› størsta varsemi. Hann heldur tí ikki, at ta› skal leggjast so nógv í tann partin av kanningini, sum vísir, hvønn veljararnir hjá teimum ymsu flokkunum helst vilja samstarva vi›, og, hvørjar flokkar teir ymsu veljararnir halda vera best førar fyri at fáa ta› bestu avtaluna vi› donsku stjørnina um framtí›arstø›u Føroya.

– Hetta eru smálutir, sum ta› neyvan er grundarlag fyri at gera nakrar politiskar metingar út frá.

Men hann heldur kortini, at kanningin vísir t‡›iligt, at ráki› í fólkinum er fram ímóti føroyskum fullveldi og ta› kann hann ikki anna› enn fegnast um.

Hann sigur, at kanningin vísir, at gøtan hjá føroyska veljaranum er grei›. Og hann ivast ikki í, at ta› er hugbur›urin hjá donsku stjørnini í samrá›ingunum, sum hevur greitt gøtuna.

– Eftir tríggjar samrá›ingarfundir er ni›urstø›an, at danska stjórnin vil ikki av vi› Føroyar. Og at danska stjórin ikki so frægt sum vildi vi›urkenna okkum sum tjó›, hevur bara styrkt fullveldisætlanina.

– Ta› stendur nú púra greitt fyri veljaranum, at ta› finst onki alternativ til fullveldi. Hann veit nú, at alt tos um sjálvst‡rislógir, og at vit eru javnbjó›is samstarvsfelagir í ríkisfelagsskapinum, er ein sápublø›ra. Hann veit, at antin taka vit fullveldi, ella blíva vit verandi í eini heimast‡risskipan, har ta› er annar parturin, sum hevur fullan yvirvaldsrætt yvir hinum.

– Hetta hevur danska stjórin nú sligi› fast vi› sjeytummaseymi og ta› veit veljarin nú, sigur Høgni Hoydal.

Ikki 100 men 1.000

Í bla›num í gjár greiddu vit frá um tær n‡ggju kyksilvurkanningarnar, sum føroyskir granskarar nú vóru farnir í holt vi›. Hesar kanningarnar fara uttan iva at vekja líka stóran ans, sum kanningar, i› vór›u gjørdar fyri sjey árum sí›ani, gjørdu um allan heim.

Men í tí eina brotinum er tíverri eitt 0 burturdotti›. Har stendur, at fyri sjey árum sí›ani, vór›u eini 100 børn kanna› fyri, hvørja ávirkan skyksilvur hevur á menning teirra. Tey, sum hava fylgt vi›, vita kortini, at talan er um 1.000 børn, sum vór›u kanna› tá. Og ta› eru tey somu 1.000 børnini, sum nú ver›a kanna› einafer› afturat fyri at vita um nøkur broyting er hend, nú tey eru blivin eldri

Blm.